## FCK økti um leiðsluna

Ein dystur var á skránni í donsku superliguni í gjár. FCK og Randers hava avt útsettan dyst hangandi í eina tíð, og hesin varð avgreiddur í gjár. Hendan dystin vann FCK 2-1, og soleiðis styrktu teir enn meira um oddastøðuna. Málini hjá FCK skutu Marcus Allbäck og Fredrik Berglund. Innskifti Tidiane Sane minkaði um munin tíðliga í seinna hálvleiki.

## 750 mió kr. fyri Messi



Italska Inter sigst nú vera til reiðar at leggja tríkvart milliard krónur á borðið fyri at fáa undirskriftina hjá Lionel Messi. 19 ára gamli argentinski spælarin hjá Barcelona hevur ein klausul í sáttmála sínum, men sambært hesum skal væl og virðilig ein milliard á borðið, áðrenn hann krevja at verða seldur. Inter hevur tó ikki hug at bjóða somikið nógv fyri spælaran, men 750 mió kr. er væl eisini ein upphædd, sum er verd at tosa um.

# Oddurin spældi javnt




*Ricardo Carvalho hevur smekkað heysin undir bóltin, og tó at Van Der Saar toyggir seg, so fær hann ikki forðað útjavningini*

**Ricardo Carvalho bjargaði Chelsea javnleikin, tá hann stútaði bóltin umvegis tvørtræið hj´aVan Der Saar. Javnleikurin var helst í lagi, tá Manchester United og Chelsea áttu hvør sín hálvleik**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Framman fyri 76.000 áskoðarum á Old Trafford spældu Manchester United og Chelsea eina heldur tama oddauppgerð sunnudagin. Tað var kanska ikki roknað við nakrari málveitslu, men virðingin, sum liðini bæði høvdu fyri hvørjum øðrum, merkti í longum løtum, at spælið gekk sera nógv á miðvøllinum, uttan at talan tó varð um teir stóru møguleikarnar.

### Vøkur mál

Fyri steðgin áttu vertirnir kanska størsta partin av spælinum. Ronaldo hevði ta einu ferðina vandamikla frísparksroynd, og á hálva tímanum fekk Louis Saha so hol á við sera vøkrum skoti. Av brotsteigarmarkinum bendi hann bóltin út um beinini á Carvalho og beint inn um stólparótina. Mál nummar 99 hjá Saha í Premier League.

Og eftir steðgin kundu vertirnir kanska avgjørt. Teir megnaðu tó ikki at gera sær dælt av kontra-møguleikunum, sum komu, nú Chelsea royndi at flyta spælið longu fram. Við at seta Robben inn fyri Geremi fekk Mourinhon eisini flutt fólkið longur fram, og hetta gav eisini úrslit at enda, tá Carvalho drønstútaði bóltin í kassan.

### Best í landinum

Javnleikurin hevur við sær, at munurin millum oddaliðini verður verandi á trimum stigum. Og sambært Sir Alex Ferguson, so fer hesin munur neyvan at minka.

- Vit prógvaðu, at vit kunnu kappast um gullið, og sum vit spæla í løtuni, so haldi eg okkum vera besta liðið í landinum, segði Ferguson.

Mourinho hinvegin tosaði einamest um Carvalho.

- Hann var avgjørt besti maður á vøllinum. Eg má bara takka heilsusektorinum hjá okkum, tí teir fingu hann kláran til dystin, segði Mourinho eftir dystin.

## Úrslit, Premier League

| | |
|---|---|
| Charlton-Everton | 1-1 |
| Aston Villa-Middlesbr. | 1-1 |
| Fulham-Reading | 0-1 |
| Liverpool-Man City | 1-0 |
| West Ham-Sheffield Utd. | 1-0 |
| Bolton-Arsenal | 3-1 |
| Newcastle-Portsmouth | 1-0 |
| Tottenham-Wigan | 3-1 |
| Man Utd.-Chelsea | 1-1 |

**Flogbóltsstøður**

**Meistaradeild kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 TB | 9 | 6 | - | 3 | 22 | 10 | 12 | 12 |
| 2 ÍF | 8 | 6 | - | 2 | 22 | 15 | 7 | 12 |
| 3 Dráttur | 9 | 6 | - | 3 | 21 | 16 | 5 | 12 |
| 4 SÍ | 8 | 4 | - | 4 | 16 | 17 | -1 | 8 |
| 5 KÍF | 9 | 2 | - | 7 | 14 | 21 | -7 | 4 |
| 6 Mjølnir | 9 | 2 | - | 7 | 8 | 24 | -16 | 4 |

**Meistaradeild menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 7 | 5 | - | 2 | 18 | 10 | 8 | 10 |
| 2 ÍF | 5 | 4 | - | 1 | 12 | 8 | 4 | 8 |
| 3 Fram | 7 | 4 | - | 3 | 14 | 14 | 0 | 8 |
| 4 Fleyr | 7 | 2 | - | 5 | 12 | 17 | -5 | 4 |
| 5 SÍ | 6 | 1 | - | 5 | 10 | 17 | -7 | 2 |

**Fótbóltsstøður**

**Danska Superligan**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 FCK | 18 | 13 | - | 4 | - | 1 | 35 | 12 | 23 | 43 |
| 2 FCM | 18 | 11 | - | 4 | - | 3 | 36 | 20 | 16 | 37 |
| 3 OB | 18 | 10 | - | 5 | - | 3 | 24 | 15 | 9 | 35 |
| 4 **AaB** | 18 | 9 | - | 4 | - | 5 | 23 | 17 | 6 | 31 |
| 5 FC Nordsj. | 18 | 9 | - | 3 | - | 6 | 35 | 20 | 15 | 30 |
| 6 Esbjerg | 18 | 7 | - | 5 | - | 6 | 31 | 29 | 2 | 26 |
| 7 Brøndby | 18 | 6 | - | 6 | - | 6 | 24 | 21 | 3 | 24 |
| 8 Randers | 18 | 6 | - | 4 | - | 8 | 24 | 26 | -2 | 22 |
| 9 Viborg | 18 | 5 | - | 3 | - | 10 | 18 | 35 | -17 | 18 |
| 10 AC Horsens | 18 | 3 | - | 7 | - | 8 | 12 | 23 | -11 | 16 |
| 11 Vejle | 18 | 2 | - | 3 | - | 13 | 19 | 42 | -23 | 9 |
| 12 Silkeborg | 18 | 2 | - | 2 | - | 14 | 15 | 36 | -21 | 8 |

Føroyskir spælarar: Jón Rói Jacobsen og Súni Olsen (AaB)

**Enska Premier League**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Man Utd. | 14 | 11 | - | 2 | - | 1 | 30 | 7 | 23 | 35 |
| 2 Chelsea | 14 | 10 | - | 2 | - | 2 | 24 | 8 | 16 | 32 |
| 3 Bolton | 14 | 7 | - | 3 | - | 4 | 15 | 13 | 2 | 24 |
| 4 Portsmouth | 14 | 7 | - | 2 | - | 5 | 19 | 12 | 7 | 23 |
| 5 Aston Villa | 14 | 5 | - | 8 | - | 1 | 16 | 10 | 6 | 23 |
| 6 Arsenal | 13 | 6 | - | 4 | - | 3 | 21 | 10 | 11 | 22 |
| 7 Reading | 14 | 7 | - | 1 | - | 6 | 16 | 18 | -2 | 22 |
| 8 Everton | 14 | 5 | - | 6 | - | 3 | 18 | 12 | 6 | 21 |
| 9 Liverpool | 14 | 6 | - | 3 | - | 5 | 15 | 15 | 0 | 21 |
| 10 Tottenham | 14 | 5 | - | 4 | - | 5 | 13 | 16 | -3 | 19 |
| 11 Wigan | 13 | 5 | - | 3 | - | 5 | 17 | 16 | 1 | 18 |
| 12 Fulham | 14 | 4 | - | 5 | - | 5 | 14 | 20 | -6 | 17 |
| 13 Middlesbr. | 14 | 4 | - | 4 | - | 6 | 11 | 17 | -6 | 16 |
| 14 Man City | 14 | 4 | - | 4 | - | 6 | 10 | 16 | -6 | 16 |
| 15 West Ham | 14 | 4 | - | 2 | - | 8 | 10 | 16 | -6 | 14 |
| 16 Blackburn | 13 | 3 | - | 4 | - | 6 | 11 | 17 | -6 | 13 |
| 17 Newcastle | 14 | 3 | - | 4 | - | 7 | 9 | 15 | -6 | 13 |
| 18 Sheffield Utd. | 14 | 2 | - | 4 | - | 8 | 8 | 19 | -11 | 10 |
| 19 Watford | 13 | 1 | - | 6 | - | 6 | 10 | 19 | -9 | 9 |
| 20 Charlton | 14 | 2 | - | 3 | - | 9 | 10 | 21 | -11 | 9 |

**Enska League One**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Nottm Forest | 19 | 12 | - | 5 | - | 2 | 26 | 12 | 14 | 41 |
| 2 Scunthorpe | 19 | 10 | - | 5 | - | 4 | 29 | 14 | 15 | 35 |
| 3 Tranmere | 19 | 10 | - | 4 | - | 5 | 23 | 13 | 10 | 34 |
| 4 Oldham | 19 | 9 | - | 5 | - | 5 | 28 | 16 | 12 | 32 |
| 5 Bristol City | 18 | 10 | - | 2 | - | 6 | 25 | 18 | 7 | 32 |
| 6 Yeovil | 19 | 8 | - | 7 | - | 4 | 21 | 16 | 5 | 31 |
| 7 Swansea | 18 | 9 | - | 3 | - | 6 | 26 | 20 | 6 | 30 |
| 8 Carlisle | 19 | 8 | - | 6 | - | 5 | 23 | 20 | 3 | 30 |
| 9 Crewe | 19 | 8 | - | 3 | - | 8 | 36 | 33 | 3 | 27 |
| 10 Gillingham | 19 | 8 | - | 3 | - | 8 | 29 | 32 | -3 | 27 |
| 11 **Blackpool** | 19 | 6 | - | 7 | - | 6 | 26 | 21 | 5 | 25 |
| 12 Doncaster | 19 | 5 | - | 9 | - | 5 | 17 | 17 | 0 | 24 |
| 13 Brighton | 19 | 7 | - | 3 | - | 9 | 24 | 28 | -4 | 24 |
| 14 Hudddersfield | 19 | 6 | - | 6 | - | 7 | 25 | 30 | -5 | 24 |
| 15 Bradford | 19 | 6 | - | 5 | - | 8 | 24 | 24 | 0 | 23 |
| 16 Chesterfield | 19 | 6 | - | 5 | - | 8 | 26 | 27 | -1 | 23 |
| 17 Port Vale | 19 | 7 | - | 2 | - | 10 | 22 | 28 | -6 | 23 |
| 18 Northampton | 18 | 5 | - | 7 | - | 6 | 15 | 18 | -3 | 22 |
| 19 Rotherham * | 19 | 8 | - | 4 | - | 7 | 29 | 24 | 5 | 18 |
| 20 Cheltenham | 19 | 6 | - | 0 | - | 13 | 16 | 28 | -12 | 18 |
| 21 Bournemouth | 19 | 3 | - | 8 | - | 8 | 17 | 26 | -9 | 17 |
| 22 Millwall | 19 | 4 | - | 5 | - | 10 | 18 | 31 | -13 | 17 |
| 23 Brentford | 19 | 3 | - | 8 | - | 8 | 16 | 31 | -15 | 17 |
| 24 Leyton Orient | 18 | 3 | - | 6 | - | 9 | 20 | 34 | -14 | 15 |

Føroyskir spælarar Claus Bech Jørgensen (Blackpool)

*) Rotherham byrjaði árið við 10 minusstigum. Hetta tí felagið er sett undir umsiting